Uppgáva 1

Umstytt framsagnirnar:

a $2a + 4a - 1\frac{1}{2}a$ **b** $4a - (2a - 1)$

c $4(2a + 3) - 2$

Uppgáva 2

$A = (-3,3)$ $B = (1,0)$ $C = (-10,-10)$ $D = (10,0)$

a Rokna longdina á AB. **b** Rokna longdina á CD.

Uppgáva 3

Rokna longdina á ókendu síðunum.



a



c

Uppgáva 4

Mánaðarlønin hjá Janusi hækkaði úr 20 500 kr upp í 21 700 kr.
Hvussu nógv prosent hækkaði mánaðarlønin.

Uppgáva 5

Tekna linjurnar l og m:
l: $y = -2 \cdot x - 1$
m: $y = 2 \cdot x + 3$

a Í hvørjum punkti skera linjurnar hvør aðra?
b Standa linjurnar vinkulrættar hvør á aðra?

Uppgáva 6

Linjan l gongur igjøgnum $A = (-2,2)$ og $B = (6,6)$.

Hvør er forskriftin hjá l?

9 Út at ferðast

Pengarnir, sum tey ymisku londini brúka, verða undir einum nevndir valuta. Danmark, Føroyar og Grønland hava somu pengar. Vit nevna teir krónur og stytta til kr.

Í talvuni niðanfyri eru pengar í øðrum londum. Har stendur eisini, hvussu teir verða styttir. Harafturat er ein teigur við **kursi**.

KURSUR

Kursurin sigur okkum, hvussu nógv 100 útlendskir pengar kosta.
Er kursurin á evrum 744, merkir tað, at vit skulu gjalda 744 kr fyri 100 evrur.

Land	Heiti á valuta	Valuta	Kursur
Evropa	Evrur	EUR	744
USA	Dollarar	USD	520
Bretland	Pund	GBP	852
Svøríki	Svenskar krónur	SEK	74
Noreg	Norskar krónur	NOK	86
Sveis	Sveisiskir frankar	CHF	491
Turkaland	Turkiskir lirar	TRY	349
Pólland	Pólskir zloty	PLN	182
Tjekkia	Tjekkiskir koruna	CZK	29

Kursir 26. aug. 2009

DØMI

Vit skriva altíð fyrst kursin, og so fara vit at rokna.

1. dømi
Hvussu nógvar krónur fær ein fyri 800 Sveisiskar frankar (CHF)?

Kursur 491.
Tað merkir 100 CHF = 491 kr.

100 CHF = 491 kr

$1 \text{ CHF} = \frac{491}{100} = 4{,}91 \text{ kr}$

$800 \text{ CHF} = 800 \cdot 4{,}91 \text{ kr} = 3928 \text{ kr}$

2. dømi
Hvussu nógv bretsk pund (GBP) fær ein fyri 1000 kr?

Kursur 852.
Tað merkir 100 GBP = 852 kr.

100 GBP = 852 kr
852 kr = 100 GBP

$1 \text{ kr} = \frac{100}{852} = 0{,}12 \text{ GBP}$

$852 \text{ kr} = 852 \cdot 0{,}12 \text{ kr} = 102{,}24 \text{ GBP}$



910 Tordis fer til Prag og ætlar at gista í 4 nætur fyri til samans 9550 CZK. Flogferðin kostar 3400 kr aftur og fram.

a Hvussu nógv kostar ferðin?
b Hvussu nógv kostar tað at gista 1 nátt?

911 Óli, Sæunn og bæði børnini fara til Madrid í Spania, og tey skulu gista har í 7 nætur.

Flogseðlarnir kosta 1315 kr fyri hvønn úr Keypmannahavn og aftur. Tey hava leigað eitt hotellkamar við 4 songum fyri 155 EUR fyri náttina.
Tey hava gjørt av, at ferðin ikki má kosta meiri enn 18 000 kr.

a Hvussu nógv hava tey til mat og undirhald?

Í Madrid keypir Sæunn einar skógvar fyri 143 evrur.

b Hvussu nógv er tað í okkara peningi?

Óli keypir einar buksur fyri 72 evrur.

c Hvussu nógv er tað í okkara peningi?

912 Stóri dreymurin hjá Valgerð er at fáa eitt Nikonfototól, sum hjá okkum kostar 8250 kr.
Í Sveis kostar tað 1625 CHF.

a Hvussu stórur er prísmunurin?
b Loysir tað seg at keypa tað í Sveis?

913 Herálvur skal á skíðferð í Fraklandi. Einar skíðir, sum her heima kosta 3850 kr, kann hann keypa fyri 435 evrur í Fraklandi.

a Hvussu stórur er prísmunurin?
b Hvar er tað bíligari hjá Herálvi at keypa skíðir?

914 Skulu vit sammeta prísirnar í ymiskum londum, kunnu vit t.d. kanna, hvussu nógv ein døgurði kostar.
Vit siga, at ein døgurði kostar 140 kr í Føroyum.

a Hvussu nógv kostar sami døgurði í evrum?
b Hvussu nógv kostar sami døgurði í pólskum zloty?
c Hvussu nógv kostar sami døgurði í norskum krónum?
d Hvussu nógv kostar sami døgurði í turkiskum lirum?